

## McDonald tekur sær av venjingini

Av persónligum ávum noyddist Brian Kerr at flúgva heim til Dublin í Írlandi í gjár. John McDonald, hjálparvenjari á føroyska fótbóltslandsliðnum, hevur ábygdina av venjingunum hjá landsliðnum í dag. Eftir at vera komnir til Skotlands og hava vant sunnudagin, noyddist Brian Kerr av persónligum ávum at fara aftur til Dublin í Írlandi. Brian Kerr vónar, at hann fær verið aftur í Skotlandi í morginárini, soleiðis at hann fær leitt venjingina undan sjálvum dystinum. Men inn til ta tíð er tað John McDonald, sum hevur høvuðsábyrgdina og skipar fyri.

*rolant@sosialurin.fo*

# Atli skal til próvtøku

**FÓTBÓLTUR** Atli Gregersen, sum spælir í Skotlandi, skal av álvara til próvtøku, tá landsliðið fer á vøllin í móti júst Skotlandi í Aberdeen í annaðkvøld. Gøtumaðurin hevur eisini alt at spæla fyri, tí hann hevur fingið nýggjan venjara, sum telist millum áskoðararnar til landsdystin

Rólant Waag Dam



*Savnsmynd*

Atli Gregersen sær av sonnum ein stóran møguleika í landsdystinum í móti Skotlandi. Ikki er tað einans ein kærkomin møguleiki at fáa nakað av tiltrongdari dystarvenjing, men tað er eisini ein av hansara eftir hondini rættiliga fáu møguleikum at vísa, hvør dugur er í honum.

Venjingdardysturin hjá fótbóltslandsliðnum í móti Skotlandi er eisini av sera stórum týdningi hjá Atla Gregersen, tí hann hevur fingið nýggjan venjara, eftir at gamli høvuðsvenjarin, Derek Adams, er vorðin hjálparvenjari hjá Hibernians.

Nýggi venjarin, sum enn bara er ein fyribilsloysn, er fyrrverandi hjálparvenjarin í felagnum, Craig Brwester. Hann og Atli Gregersen hava alla tíðina funnið væl útav tí, so við venjaraskiftinum sær Atli Gregersen brádliga fleiri møguleikar í landsdystinum í móti Skotlandi.

– Ein próvtøka verður tað hjá mær, eingin ivi um tað. Við venjaraskiftinum opnast allir møguleikar aftur, og næsta tíðin verður sera spennandi, tí hetta kann broyta heilt nógv, sigur Atli Gregersen úr Skotlandi.

Venjaraskiftið er so mikið nýtt, at Craig Brewster valdi at nýta somu leikararnar sum Derek Adams gjørdi, tá Ross County spældi í gjár. Við øðrum orðum spældi Atli Gregersen heldur ikki í gjár.

– Men eg havi tosað við venjaranum, sum kemur at hyggja í morgin. Hann hevur sagt við meg, at spæli eg gott við landsliðnum nú, so spæli eg fyri Ross County um vikuskiftið. Sjálvandi skal tað eisini takast við einum fyrivarni, men eg síggi heilt víst ein møguleika í hesum, sigur Atli Gregersen bjartskygdur.

### Landsdysturin er møguleikin hjá øllum

Eins og Brian Kerr vísir á, so heldur Atli Gregersen eisini, at landsdysturin ein fínur møguleiki hjá leikarunum at vísa seg fram í.

– Hetta er ikki bara mín møguleiki at sannføra mín venjara, men hetta er ein sýnisgluggi hjá øllum leikarunum. Dysturin verður eisini vístur á Sky, so tað eru sera nógv fólk, sum koma at síggja okkum spæla, greiðir Atli Gregersen frá.

Tí, sigur hann eisini, at landsdysturin er nógv meira enn bara ein venjingardystur. – Nú er ein landsdystur ongantíð bara ein landsdystur, men undir venjingini í gjár merkti eg væl, at tað stendur nógv upp á spæl og leikararnir eru spentir, sigur Atli Gregersen.

### Nógv fokus á Atla

Av tí, at Atli Gregersen sum tann einasti føroyingurin spælir í skotskum fótbólti, hava fjølmiðlarnir í Skotlandi stóran áhuga í honum um dagarnar.

– Eg havi tosað við fleiri ymsar fjølmiðlar, so tað er nógv fokus kring mín persón nú. Teir spyrja nógv til Føroyar og hvat føroyskur fótbóltur er fyri nakað. Teir eru eisini ógvuliga áhugaðir í Brian Kerr, so hetta hava verið nakrir hektiskir dagar, men tað passar mær fínt.

Skotar eru eisini sum heild áhugaðir í Føroyum. Ikki minst tí, at vit hava spælt í móti hvørjum øðrum so ofta fyrr, og at Føroyar eisini hava fingið eitt gott úrslit í móti teimum, sigur Atli Gregersen.

Atli Gregersen sigur somuleiðis, at skotar taka dystin í ógvuliga stórum álvara og síggja fram til í annaðkvøld.

*rolant@sosialurin.fo*




***Høgri bakkurin, Jónas Tór Næs, er nú ein av útisetunum á landsliðnum***

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Átta útisetar á landsliðnum

**FÓTBÓLTUR** Tá tríggir ungir føroyingar eftir kappingarárið valdu at skifta føroysku feløg síni út við íslendskan fótbólt, øktist talið av útisetunum á landsliðnum munandi

Rólant Waag Dam

Ofta hevur verið ført fram, at talið av leikarum, sum spæla uttanfyri Føroyar, er alt ov lítið á landsliðnum. Men síðani landsliðið seinast spældi, eru tríggir leikarar, sum áður spældu í Føroyum, farnir út um landoddarnar at royna seg.

Christian R. Mouritsen, Jónas Þór Næs og Pól Jóhannus Justinussen hava allir skift til íslendska Val, har Kristján Guðmundsson, ið stóð á odda fyri HB fyrr í ár, er venjari. Umframt teir tríggjar í Íslandi, telur føroyska fótbóltslandsliðið eisini leikarar í Onglandi, har Jóan Símun Edmundsson í Newcastle og Gunnar Nielsen í Tranmere Rovers spæla. Í Skotlandi hava vit Atla Gregersen í Ross County, í Noreg er Rógvi Baldvinsson í Álgård og í Danmark spælir Christian Lamhauge Holst.

*rolant@sosialurin.fo*

**Landsliðsleikararnir, sum spæla uttanfyri Føroyar:**

Jóan Símun Edmundsson, Newcastle
Atli Gregersen, Ross County
Christian L. Holst, Silkeborg
Rógvi Baldvinsson Álgård,
Gunnar Nielsen, Tranmere Rovers
Christian R. Mouritsen, Valur
Jónas Þór Næs, Valur
Pól Jóhannus Justinussen, Valur